35

DOT OYRAVERND



Góðtak ongantíð óljóð

Óljóð ávirkar heilsuna, góðtak tí ongantíð gerandisdagin við gangi og óljóðum.

*Fyribyrg við persónliga formstoypta DOT oyraverndini frá Phonak*



Til eina og hvørja støðu

Líkamikið hvar tú upplivir óljóð, eigur tú at verja teg.

*Tak ábyrgd fyri tíni hoyrn*



Betri lívsvirði

Persónliga formstoypt oyravernd frá Phonak merkir meiri virkni og lívsvirði.

*Bæði til arbeiðis og í frítíðini*

PHONAK life is on

Ring og bílegg tíð til eina ókeypis hoyriroynd

Hoyrnin, N. Finsensg. 51, Tórshavn, tlf. 321731

HOYRNIN

www.hoyrnin.fo

Sosialurin 341800

# Ergo Vælvera til kropp og andlit

## Ergo í J.C. Svabosgøtu í Havn læt 1. november upp nýggja vælverustovu, ið bjóðar fleiri sera vælumtóktar krops- og andlitsviðgerðir

Tað er Beinta við Sandá Lassen, ergoterapeutur, ið eigur og rekur Ergo Vælveru. Á vælverustovuni fæst ein hópur av viðgerðum, sum eru væl kendar í londunum kring okkum. Fyri tey sum vilja klænka, fáa fastara kropp, forma kroppin, lyfta rumpuna, minka um appilsinhúð ella taka feitt burtur, eru nógvir møguleikar sum t.d. SlankiWrap, KvikSlim, LPG, LIFT6, UltraLipo v.m. Umframt fleiri sløg av slankiviðgerum, bjóðar Ergo Vælvera eisini viðgerðir sum innihalda millum annað djúpa bindivevsmassagu, ið hjálpir ímóti pínu orsakað av gikt, fibromyalgi, lymfuødem o.ø.

Ein viðgerð er BioEnergiser D-tox fótabað, sum fær kropskyknurnar í javnvág. Til andliti er Lift 6 andlitsviðgerð, sum er ein kollveltandi viðgerð, ið veruliga hjálpir væl ímóti aldursteknum og kann taka burtur undirhøkuna.

UltraLipo ella betur kent sum »feittsúgving« uttan kirurgi, er ein ultraljóðsviðgerð ið niðurbrýtur feitt og gevur sama varandi úrslit sum ein feittsúgving, men her slepst undan nálum, narkosu og sjúkramelding. Viðgerðin er góð til at taka burtur feittdepot á t.d búki, BH-dellum, dansihondtøkum, ríðilørum, mannfólkabróstum o.l.

SlankiWrap gevur garanti, klænka minst 15 cm ella er viðgerðin ókeypis. Vanligt er at klænka millum 22-35 cm longu fyrstu ferð, og eina heila ella tvær klædnastøddir aftan á 3-4 viðgerðir.

Eisini eru tvær serviðgerðir, sum hártøka við lasara, ið er ein permanent loysn, eins og VeinWave sum tekur burtur reyð sjónlig blóðkør í andlitinum.

Umframt allar viðgerðirnar sum klænka, stramma og forma kroppin, fæst eisini tann vælkenda Dr. Magic massagan, sum er massaga í heimsklassa og dagsljósviðgerð móti vetrartroyttheit.

Ergo Vælvera hevur altíð góð tilboð, um tú samansetur ymsar viðgerðir. Til dømis kanst tú, samstundis sum tú liggur wrappað í bandagur fyri at stramma kroppin, fáa eina super uppstrammandi og yngjandi andlitsviðgerð.

Hjá Ergo Vælveru arbeiða fýra fólk, tríggir ergoterapeutar og ein sjúkrarøktarfrøðingur.

Beinta við Sandá Lassen sigur, at eitt gávukort frá Ergo, er ein góð og persónlig jólagáva. Kanska serliga tí tá jóla- og nýggjárshøgtíðin er farin afturum, eru tað nógv sum hava ringa samvitsku og ynskja at fáa kroppin í form aftur. Gávukort kunnu eisini keypast á nethandlinum ergo.fo.

Umframt aðrar vørur fæst øll serian frá Beauté Pacifique, sum er viðmælt av húðlæknum, til keyps í vælverustovuni.

*Meira fæst at vita á heimasíðuni www.ergo.fo*

